**SEMJA**

**MILLUM**

**REIÐARAFELAGIÐ FYRI FARMASKIP**

**OG**

**SJÓMANNADEILD FØROYA FISKIMANNAFELAGS**

Omanfyrinevndu partar eru samdir um at leingja galdandi sáttmálar til 1. mars 2017 við hesum broytingum:

## Høvuðssáttmálin

1. Lønin hækkar 1. mars 2015 1,98 % og 1. mars 2016 2,25 %.

2. Eitt eyka stig verður sett í kokkaviðbótina, har talið av mynstraðari manning er 20 ella fleiri. Hetta viðbótarstig verður 200 krónur omanfyri tað, sum er fyri 14 – 19 mans. Tað vil siga 3.100 kr í vanligu lønartalvuni og 3.900 í lønartalvuni fyri frálandavinnu.

3. Í grein 1, stk. 3 verða lærlingalønirnar broyttar til
   1. árið 50%
   2. árið 55%
   3, árið 60%
   4. árið 75%

4. Í grein 6, stk. 1 verður verandi orðing strikað, og ístaðin verður sett henda orðing: "*Manningin verður sett í starv eftir teim treytum, sum lóggávan ásetur, og við teim hýruavtaluformálum, sum eru kravdir av myndugleikunum.*"

   Fyri sjófólk fevnt av hesum sáttmála verður sostatt í teigi j í nú galdandi hýravtaluformála víst til sáttmálan millum undirritaðu feløg.

5. Partarnir eru samdir um at kanna viðurskiftini í mun til ásetingina í grein 7, stk. 7, soleiðis at greitt er, um manning er dekkað av tryggingini ella ikki.

## Sersáttmálin fyri størri skip í frálandavinnu

6. Sáttmálin broytir heiti til "*Sersáttmáli fyri dekkarar og kokkar við størri skipum í frálandavinnu.*"

7. Í grein 5, stk. 1 verður hin 1. mars 2016 talið "*5*" broytt til "*4*" og "*1. mars 2011*" broytt til "*1. mars 2016*".

**Sersáttmálin fyri smærri skip í frálandavinnu**

8. Sáttmálin broytir heiti til "*Sersáttmáli fyri dekkarar og kokkar við smærri skipum í frálandavinnu.*"

9. Í grein 4, stk 3 verður broyt til at enda soleiðis: "*..., sum svarar til 50 % av daglønini í 1 mánað.*" Restin av stykkinum verður strikað.

**Tórshavn, 27. februar 2015**

**Fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip**

Jens Meinhard Rasmussen, formaður

**Fyri Sjómannadeild Føroya Fiskimannafelags**

Egil Finsson, formaður